# ÁRSFRÁGREIÐING

2023

MÁLRÁÐIÐ

# Innihalds-yvirlit


| | |
|---|---|
| Inngangur | 3 |
| Endamál | 7 |
| Limirnir í Málráðnum | 8 |
| Starvsnevndin | 11 |
| Málstovan | 11 |
| Ráðgeving | 12 |
| Fundir í Málráðnum | 14 |
| Stavsetingarorðabókin | 15 |
| SignWiki Føroyar | 16 |
| Hendingar í 2023 | 16 |
| Roknskaparárið 2023 | 17 |




*Inngangur*

# Árið, ið fór:

- Landsstýriskvinnan á vitjan
- Nýtt búmerki
- Talgild skjalhaldsskipan og arbeiði í samsvari við fyrisitingarlóg og góðan tænastusið
- Nýggj starvsfólk
- Vaktarskifti á brúnni
- Eftirmeting av lógini um málráð, sum bleiv til frágreiðing um, hvussu lógin um málráð virkar
- Spenningur um meirjáttan at geva *Stavsetingarorðabókina* út á móðurmálsdegnum 2024
- Betri skipan og yvirlit á arbeiðnum hjá Málráðnum og Málstovuni við árshjóli við fundaryvirliti, málseting o.ø.
- Málstovuni tørvar stjóra



## LANDSTÝRISKVINNAN VIÐ FYLGI Á VITJAN, OG NÝTT BÚMERKI AVDÚKAÐ

28. apríl var landsstýriskvinnan í mentamálum, Sirið Stenberg, við fylgi á vitjan á Málstovuni í Reinshúsi. Hetta er okkum vitandi fyrsta ferðin, at landsstýrisfólk hevur vitjað stovnin og fregnast um arbeiði okkara. Hugaligt, tá ið tey, sum varða av okkum, sýna okkum ans. Hølisumstøðurnar eru trongar, men góðar, tá ið hugsað verður um grannalagið og dagliga arbeiðið. Eitt sindur verri er, tá ið vit skulu hava fund, bæði starvsnevndarfund (5-8 fólk) og málráðsfund (15-17 fólk), men tað var ikki meira enn hálvtalað orð, so bjóðaðu landsstýriskvinnan og fylgi hennara okkum at fundast í fundarhølum teirra á Eirargarði. Ein góð loysn, sum vit eru serstakliga fegin um. 28. apríl var eisini dagurin, tá ið nýggja búmerkið hjá Málráðnum varð avdúkað. Tað er Sjúrður Højgaard hjá fyritøkuni Kodio, ið hevur sniðgivið. Tað sipar við sínum víkingamynstri, skjøldri, (ljóð-)bylgjum og hornum bæði aftur til fortíð, samtíð og framtíð. Onkur hugsar helst um føroyskan samleika og føroysk klæði, og hallið á búmerkinum svarar til hallið á landgrunninum, sum Føroyar og føroyskt byggja á.

## TALGILDA SKJALHALDSSKIPANIN

Talgilda skjalhaldsskipanin kom loksins at virka á sumri 2023. Vit fyrireikaðu okkum væl til hetta og settu fólk í verkætlanarstarv at meta um arbeiðsbyrðuna og fyrireika skipaða umsiting av stovninum sambært dagsins krøvum, men alt tóktist koma í drag. Meiningin var, at yvirlit skuldi fáast yvir umsitingarliga arbeiðið og fáa tað savnað í *eina* funktión. Vit høvdu væntað, at tað fór at taka einar tríggjar mánaðir, men tað tók knappliga hálvt annað ár og luftina úr starvsfólki og starvsnevndarlimum, tí tey eru so skerd og smábýtt, hvat arbeiðsorku viðvíkur. Vit løgdust ikki á boðini, men fóru í holt við at orða starvslýsing, so vit kundu seta fólk. 1. august byrjaði stjórnarskrivarin á málstovuni, og hevur tað verið ein lætti fyri hini bæði starvsfólkini á Málstovuni og ein trygd, tí nú arbeiða vit eftir fyrisitingarlóg og kunnu fylgja lógini um góðan tænastusið. Nakað av uppruddingararbeiði er, men tað er ein verkætlan fyri seg, sum verður tikin í stigum. Tað dagliga klára vit at arbeiða undan, og vit taka stráini, sum hava staðið eftir, so hvørt.

## VAKTARSKIFTI Á BRÚNNI

Vaktarskifti var eisini á sumri 2023, soleiðis at Randi Kúrberg, varaforkvinna, loysti Helenu Kannuberg, forkvinnu, av. Broytingin var meira at kalla formlig, tí báðar komu í Málráðið á sumri 2021 og hava arbeitt tætt saman alla tíðina. Tað er neyðugt, tí arbeiðið er umfatandi og samansett. Tað er bæði gott at hava

onkran at tosa við og býta arbeiðsuppgávurnar sínámillum, tá ið tað snýr seg um leiðslu. Og at standa á odda fyri Málráðnum er ikki arbeiði, sum verður gjørt "eftir skúlatíð".

**Á VÁRI SPURDU MYNDUGLEIKARNIR EFTIR NÝGGJARI EFTIRMETING AV MÁLRÁÐNUM**

Lógin um málráð sigur, at frágreiðing um, hvussu lógin um málráð virkar, skal gerast eftir trimum árum. Ein eftirmeting er longu gjørd, men hon varð ikki almannakunngjørd. Onkur politikari hevur verið frammi og spurt eftir eftirmetingini, og tað er gott. Okkara arbeiði og umstøður viðvíkjandi arbeiðsmegi, hølum, tíðarbæri og fígging eiga og skulu fáa almenna viðgerð, tí vit eru á landsins fíggjarlóg. Undanfarna landsstýrisfólk náddi ikki at seta nýggja eftirmeting í verk, og verandi landsstýrisfólk segði alt fyri eitt, at tíðin var farin frá gomlu eftirmetingini, og at nýggj skuldi gerast. Á vári 2023 fingu Málráðið og Málstovan at vita, at vit skuldu fara at fyrireika eftirmeting, seta eftirmetingarbólk og hava javnstøðu í huga. Hetta arbeiðið fór lutvíst í gongd, men orðaði setningurin var stórur í vavi samanborið við arbeiðsorku og fígging. Arbeiðsbólkurin skipaði seg innan fyri settu karmar, men arbeiðið hevur drigið út, lutvíst tí at fíggjarjáttanin setur ferðina (lønandi arbeiði verður tikið framum, tí tað fíggjar tilveruna), lutvíst tí arbeiðsuppgávurnar hjá forfólkunum eru nógvar og smábýttar, soleiðis at raðfestingar og umraðfestingar verða gjørdar regluliga. Tað hevur eisini fingið tað úrslit, at kravið um eftirmeting bleiv broytt til frágreiðing, sum er munandi lagaligari at hava við at gera. Arbeiðsbólkurin metti, tá ið hann førdi ynski um frágreiðing fram, at tilmæli og niðurstøður væl kunnu gerast. Forkvinnan, sum hevur skrivaraleiklutin í arbeiðsbólkinum, sat ein part av sumrinum og gjørdi ymiskt kanningararbeiði, sum bleiv lagt fyri Málráðið á fundi síðst í august. Viðmerkingar og ráð vórðu tikin við í framhaldandi arbeiðið, sum arbeiðsbólkurin umrøddi av og á gjøgnum heystið, men dagarnar millum jóla og nýggjárs sat skrivarin og royndi at fáa tað at líkjast, so frágreiðingin kundi fara til endaliga viðgerð og hoyring hjá málráðslimunum tíðliga á vári 2024. Um alt gongst sum ætlað, fær landsstýriskvinnan frágreiðingina á vári 2024, og er vónin, at frágreiðingin fær góða viðgerð og viðferð.

***STAVSETINGARORÐABÓKIN*, LØGGILDING OG JÁTTAN TIL RÆTTLESTUR**

Heystið og tíðin undan jólum gekk við at fáa lagt síðstu hond á *Stavsetingarorðabókina*, sum hevur verið í gerð í gott tíggju ár. Arbeiðið hjá ritstjóra og fylgibólki hevur gingið sína gongd, og endin hevur verið í eygsjón,

men ógreiða var um løggildingarleist. Heystið gekk við at finna fram til løggildingarleist og fáa Mentamálaráðið at góðkenna hann. Harumframt var spennandi og avgerandi fyri, at *Stavsetingarorðabókin* skuldi koma út á vári 2024 (helst á móðurmálsdegnum 25. mars), at játtan fekst til rættlestur og útgávutiltak. Tá fíggjarlógaruppskotið kom í ljós, var eingin meirjáttan. Aftur at ganga í mótbrekku, men seiggi og treiskni er í summum okkara, og vit at banka uppá hjá teimum politikarunum, ið vit hildu skilja støðuna, og sum vit høvdu varhuga av vildu málinum væl. Tá tingið fór í jólafrí, var játtanin hækkað, og fegnaðust vit øll um hesa jólagávu, tí tá ið *Stavsetingarorðabókin* verður almenn, fær alt Føroya fólk burtur av hesi jólagávu.

## ÁÐRENN VIT SLUPPU Í JÓLAFRÍ, SKULDU VIT AFTUR SETA STARVSFÓLK

Málsligi samskiparin var farin í farloyvi. Áhugin fyri starvinum var stórur, og tað fegnast vit um, tí okkum og landinum tørvar málhugað fólk. Vit eru spent og fegnast um okkara lítla, men spírandi málumhvørvi, sum nú telur trý starvsfólk.

## ÁÐRENN FORKVINNURNAR FÓRU Í JÓLAFRÍ, BLEIV ÁRSHJÓL VIÐ FYRIBILS FUNDARYVIRLITI, MÁLSETING OG STØRRI TILTØKUM FYRI 2024 GJØRT

Við hesum verður arbeiðið betur skipað og er ætlað sum plástur á sárið fyri manglandi dagliga leiðslu. Forkvinnan hevur eitt alsamt størri ynski og vaksandi vón um, at Málráðið fær stjóra at taka sær av dagligu leiðsluni. Orsøkin er einføld: arbeiðsferðin kemur upp, og fíggjarjáttanin verður brúkt við hægri umdreygingum og munandi meira ágóða.





# Endamál

Málráðið hevur sum endamál at røkja, menna og verja føroyska málið, at vegleiða, ráðgeva og gera niðurstøður í málspurningum og at áseta føroyska stavseting. Málráðið skal harumframt serskilt røkja, menna og verja føroyska teknmálið. Málráðið skal savna og skráseta nýkomin orð, máliskur, framburðir og onnur málslig fyribrigdi í føroyskum og vera til hjálpar at velja og evna til nýggj orð. Sama er eisini galdandi fyri føroyskt teknmál.

Málráðið gevur landsstovnum og almenningi vegleiðing, ráð og upplýsing í spurningum um føroyskt mál í talu og skrift eins og um føroyskt teknmál. Almennir myndugleikar eiga í størst møguligan mun at fylgja niðurstøðunum hjá Málráðnum.

Málráðið eigur at samstarva við fjølmiðlar, stovnar og almennar myndugleikar, ið hava stóra málsliga ávirkan. Í sambandi við yrkisbólkar skal Málráðið menna gott føroyskt yrkismál og annars skipa fyri átøkum málinum at frama.

Málráðið ritstjórnar og greiðir til útgávu føroyska stavsetingarorðabók, sum landsstýrismaðurin løggildir. Almennir myndugleikar hava skyldu at fylgja ásetingunum í stavsetingarorðabókini. Málráðið er málrøktar- og málmenningarstovnur, skipaður undir landsstýrinum og í virksemi sínum óheftur av politisku skipanini.

# Limir í Málráðnum



**Randi Kúrberg, *forkvinna***

MA í føroyskum, eftir tilmæli frá Námi



**Meifríð Weihe Hansen**

Heilsurøktari, undirvísir í teknmáli, eftir tilmæli frá landsstýrismanninum



**Helena Kannuberg, *næstforkvinna***

MA í føroyskum, eftir tilmæli frá Føroyamáli



**Johan Blábjørg**

Fríyrkis teknmálstulkur, undirvísir í teknmáli, eftir tilmæli frá Deyvafelagnum/Felagnum HOYR



**Eyðun á Borg**

Lærari, eftir tilmæli frá landsstýrismanninum

**Rakul Skaale Andreasen**

MA í føroyskum, eftir tilmæli frá Fróðskaparsetri Føroya

# Limir í Málráðnum



**Elin Henriksen**
Lærari, eftir tilmæli frá Móðurmálslærarafelag Føroya

**Bergur Rasmussen**
Lærari, eftir tilmæli frá Rithøvundafelag Føroya



**Theodor Eli Dam Olsen**
Teologur, prestur, eftir tilmæli frá Javnstøðunevndini



**Heri Jógvan Joensen**
Teologur, prestur, eftir tilmæli frá Navnanevndini



**Lena Reinert**
Vísindaligt hjálparfólk á Føroyamálsdeildini, BA í føroyskum, eftir tilmæli frá Staðarnavnanevndini

# Starvsnevndin

Starvsnevndin er mannað við hesum limum í Málráðnum: Randi Kúrberg, forkvinnu, Helenu Kannuberg, næstforkvinnu, Rakul Skaale Andreasen, Theodor Eli Dam Olsen og Elini Henriksen. Harumframt hevur Lena Reinert, tiltakslimur, verið á starvsnevndarfundum í novembur og desembur, tá ið øðrum hevur borist frá.

# Málstovan

Málstovan er skrivstovan hjá Málráðnum, og har starvast:



**Kristin M. Magnussen,** ***málfrøðingur***

kristin@malrad.fo, 312397

MÁLRÁÐIÐ

**Ragnar Sigrunarson,** ***málsligur ráðgevi og samskipari***

ragnar@malrad.fo, 312397



**Ingibjørg Oddmarsdóttir Petersen,** ***skrivari***

malrad@malrad.fo, 312397

# Ráðgeving

Málstovan veitir stovnum og einstaklingum málsliga leiðbeining. Øll eru vælkomin at skriva til málstovuna á malrad@malrad.fo ella at ringja á tlf. 312397. Telefontíðin hjá Málráðnum er mánadag-fríggjadag 9-14.

Málstovan heldur til í Reinshúsi, Handan Á 5, í Havn.

**215**

*spurningar vóru svaraðir í 2023*

**237**

*spurningar vóru svaraðir í 2022*

# Slag av spurningum

Í 2023 snúðu 12 % av spurningunum seg um stavseting, 6 % um mállæru, 1 % um málbering, 78 % um týðing, og 3 % snúðu seg um annað.

Flokkingin *týðing* fevnir um alt frá yrkisorðum til, hvussu bókarheiti kunnu umsetast. Í flestu førum verður orðasmíð flokkað undir *týðing*, av tí at tað snýr seg um at finna eitt føroyskt nýyrði fyri útlendskt hugtak. Spurningar snúgva seg ofta um bæði týðing og stavseting, t.d. um spurt verður, hvussu vit á føroyskum siga ‘season/sæson’ í sjónvarpsrøðum. Spurningurin snýr seg í útgangsstøðinum um týðing, men endar sum ein spurningur um stavseting og bending (vit siga *sesong*, og tað bendist sum *bygd*).

Tað eru leik og lærd, ið seta Málstovuni spurningar. Miðlar spyrja m.a. um stavsetingarreglur, eitt nú um tað eitur *í* ella *á* eini app. Svarið frá Málráðnum til henda spurning var *í appini*, tí at vit hava hug at brúka *á*, tá ið vit tosa um úrtøkilig fyribrigdi, og ítøkiligari tey vera, betri hug tykjast vit at hava at brúka *í*, t.d. *á bygd: í bygdini* og *á goymslu: í goymsluni*. Tað varð tó lagt

afturat, at tað kann vera torført at gera fastar reglur um hetta. Almennir stovnar spyrja ofta um orð ella orðingar í sambandi við lóggávu, starvsheiti og líknandi. Eitt dømi er um starvsheiti í tingskipanini. Til hendan spurningin svaraði Málráðið soleiðis: Málráðið mælir til, at heitið *løgtingsfólk* verður nýtt, tá lívkynið er óvist ella óviðkomandi, men at heitini *løgtingsmaður* og *løgtingskvinna* í øllum øðrum førum verða javnsett við heitið *løgtingsfólk*. Hesi trý orðini eru greið og málsliga góð, umframt at tey longu eru algongd í talu og á skrift. Fyritøkur spyrja ofta um føroysk heiti fyri ensk orð. *Animatión* og sagnorðið at *animera* ber til at nýta fyri ensku orðini *animation* og *to animate*. *Bjølgfrukt* og *bjølgmeti* fyri danska orðið *bælgfrugt* og *opin kelda* fyri ensku orðingina *open source*.

Ikki allir spurningar, ið verða settir Málstovuni, verða svaraðir, av tí at arbeiðsorkan á stovninum er sera avmarkað. Tørvurin á málsligari ráðgeving er stórur og støðugt vaksandi. Serliga málamótið við enskt og danskt krevur áhaldandi, at føroysk nýyrði verða gjørd, og at tøkuorð verða lagað til føroyska bending og stavseting. Hesin tørvurin er sjónligastur í nógvu spurningunum um týðing, sum vóru minni enn 50 % í fjør, men meir enn 75 % í ár. Flestu spurningar koma við telduposti frá stovnum og fyritøkum, men øll eru vælkomin at skriva og ringja til Málstovuna.

Starvsfólkini á Málstovuni byrjaðu at brúka journalskipanina *Skjalhald* í august 2023 sum partur av nýskipaðu fyrisitingini. Umleið 100 málspurningar vóru skrásettir við ársenda, umframt onnur fyrisitingarlig mál. Við skipanini verður helst greiðari yvirlit og møguleiki at føra hagtøl yvir, hvørjir spurningar verða settir og svaraðir og hvørjir tíverri ikki verða avgreiddir.



# Fundir í Málráðnum



Í 2023 vóru tveir fundir í Málráðnum: 1. juni og 24. august. Limirnir í starvsnevndini og Málráðnum hava fingið fundarfrásøgnina til viðmerkingar innan fimm yrkadagar eftir, at fundur hevur verið.

Á fundinum í juni varð játtanin til teknmál umrødd, og Málráðið samtykti at halda fram at fíggja dagføringar av teknmálsorðabókini *SignWiki Føroyar*.

Í § 10, stk. 3 í *Lóg um málráð* stendur, at ”Landsstýrismaðurin skal eftir 3 árum leggja fyri Løgtingið frágreiðing um, hvørt lógin virkar eftir ætlan, og kanna um til ber at áseta reglur um Málráð, Staðarnavnanevnd og Navnanevnd í somu lóg.” Í 2016 varð ein frágreiðing gjørd, men hendan varð ikki løgd fyri tingið, av tí at hon ikki varð mett at lúka krøvini til eina hóskandi frágreiðing. Í fjør vendi Mentamálaráðið sær til Málráðið við tí í hyggju at gera eina nýggja, tíðarhóskandi eftirmeting, og á málráðsfundinum í juni og aftur á fundinum í august umrøddi ráðið, hvussu frágreiðingin skal skipast formliga og fíggjast.




# *Stavsetingar-orðabókin*

*Stavsetingarorðabókin* er orðabók, sum Málráðið ritstjórnar og gevur út, og sum landsstýrisfólkið í mentamálum løggildar. Hetta merkir, at allir almennir stovnar hava skyldu at fylgja ásetingunum í *Stavsetingarorðabókini*. Umframt stavseting ásetur orðabókin teknseting, bending, kyn og sjálvt stavraðið. *Stavsetingarorðabókin* er grundað á *Føroyska orðabók*, ofta nevnd *Móðurmálsorðabókin*. *Stavsetingarorðabókin* er ætlað at lýsa føroyskt nútíðarmál, og tí verða summi orð í *Móðurmálsorðabókini* sáldað frá, m.a. ávís orð úr kvæðamáli, meðan onnur nýggjari orð, sum ikki eru skrásett í *Móðurmálsorðabókini*, verða løgd aftur at *Stavsetingarorðabókini*. Ein ritstjóri á málstovuni varðar av orðabókini saman við einum fylgibólki, sum Málráðið setur.

Arbeiðið við *Stavsetingarorðabókini* gongur framá og mett verður, at við ársenda er handritið klárt til rættlestur. Uml. 61.000 leitorð eru higartil í *Stavsetingarorðabókini*. Arbeiðið komandi tíðina verður at avgreiða rættlestur, seta nýggjari orð inn í orðabókina. Ætlanin er, at *Stavsetingarorðabókin* verður at finna á nýggju heimasíðuni hjá Málráðnum til várs.

# SignWiki Føroyar

Á fíggjarlógini fyri 2023 vórðu 100.000 kr. játtaðar til menning av føroyskum teknmáli, og fyri ta játtanina varð verkætlanarstarvið hjá Edny Poulsen og Eyðgunn Hansen longt. Arbeiðið fevnir um at dagføra føroysku teknmálsorðabókina *SignWiki Føroyar*, sum er tøk á www.fo.signwiki.org. Edny og Eyðgunn eru útbúnir lærarar og teknmálstulkar, og báðar hava drúgvar royndir við tulking, undirvísing og orðabókaarbeiði. Endamálið við orðabókini er at miðsavna og varðveita teknmálsliga orðfeingið – ella *teknfeingið* – sum deyv í Føroyum hava ment sínámillum og í samspæli við grannar okkara í Norðanlondum. Í føroyska teknmálinum eru málføri eins og í talumálinum, og teknmálsorðabókin virkar við til, at hetta fjølbroytnið verður skjalfest og stimbrað. Orðabókin skal vera brúkaravinarlig hjá deyvum og hoyrandi, sum vilja læra seg at samskifta á føroyskum teknmáli, og hetta verður gjørt við at leggja dagførdar films- og ljóðupptøkur aftur at øllum leitorðum. Harumframt greiðir hvørt uppslag frá, hvussu og hvar hondin verður hildin, tá teknið verður gjørt.

Verkætlanin hevur harumframt fingið stuðul frá Mentamálaráðnum til orðabókagerð, og henda upphæddin verður brúkt til høli og neyðuga útgerð at gera upptøkur í høgari góðsku. Verkætlanarstørvini og stuðulin hava gjørt tað gjørligt at leggja fleiri tekn aftur at orðabókini, men arbeiði við orðabókum krevur áhaldandi dagføringar, og tí verður tørvur á, at føroyska teknmálið framhaldandi verður raðfest.

# Hendingar í 2023

Á móðurmálsdegnum 25. mars varð enn eina ferð skipað fyri kahoot-kapping, og í tí sambandi var málsligi ráðgevin í *Góðan morgun Føroyar* og kunnaði um dagin. Tosað varð eisini um máltøkni, og ráðgevin greiddi frá framstigunum, sum eru gjørd seinastu fáu árini. M.a. er ein máltøknidepil settur á stovn á Føroyamálsdeildini.

Í apríl í ár søkti Málráðið eftir skrivara, og Ingibjørg O. Petersen varð sett í starv. Talan er um eitt nýtt starv á Málstovuni, og starvsfólkini eru nú trý í tali. Málráðið fekk eisini journalskipanina Skjalhald, og sum partur av nýskipaðu fyrisitingini fer Skjalhald at geva málstovuni eitt greiðari yvirlit yvir málsviðgerðir og gera tað gjørligt at hava yvirlit yvir samtyktar mannagongdir, so lættari er at finna mál aftur. Eisini við atliti til at veita alment innlit og leita upp, hvat er samtykt, t.d. prinsippiellar avgerðir viðvíkjandi stavseting.

Í juli í ár býttu forkvinnan og næstforkvinnan um leiklut, og Randi Kúrberg er nú forkvinna, og Helena Kannuberg er næstforkvinna.

15. desembur varð ársins orð kosið í beinleiðis útvarpssending, og tað gjørdist *vitlíki*. Lena Reinert, sum átti ársins orð 2022, *stuttflutt*, umboðaði Málráðið til hetta árliga tiltakið, sum Kringvarp Føroya stendur fyri.

# Roknskaparárið 2023

Játtanin hjá Málráðnum fyri 2023 var tilsamans 1.751.000 kr. Útreiðslurnar vóru 1.701.228 kr.

Játtanin hevur hildið, við einum lítlum avlopi á lønum. Tilsamans er avlopið 3 % sum svarar til 49.772 kr., sum væntast at verða brúktar til útgjald av lønarhækkingum í 2023 hjá starvsfólkum á Málstovuni, sum verða lønt eftir sáttmálum, ið gingu út á heysti í 2022.

100.000 kr. av játtanini eru oyramerktar til menning av teknmáli.

Játtanin fyri 2023 er hækkað 100.000 kr. til, at Málráðið verður við í Skjalhaldi og til menning av nýggjari heimasíðu í sambandi við, at *Stavsetingarorðabókin* kemur út á vári 2024.

| | | Játtan | Útreiðslur |
|---|---|---|---|
| 11 | Lønir | 1.521.000 | 1.383.974 |
| 14 | Keyp av vørum og tænastum | 127.000 | 221.055 |
| 15 | Keyp av útbúnaði | 20.000 | 11.075 |
| 16 | Leiga og viðlíkahald | 0 | 2.124 |
| 71 | Innanhýsis flyting millum stovnar | 83.000 | 83.000 |
| | **Tilsamans** | **1.751.000** | **1.701.228** |

MÁLRÁÐIÐ